## Rógvi brendi brotsspark



Rógvi Jacobsen var millum teir bestu spælararnar hjá Hødd, tá teir um vikuskiftið spældu venjingardyst ímóti felagnum Atla. Tíðliga í dystinum fekk Hødd brotsspark, sum Rógvi brendi. Rógvi gjørdi tað gott aftur, tá ið hann so skoraði til 1-0 eina løtu seinni. Dysturin endaði við javnleiki 2-2, og heimasíðan hjá Hødd skrivar, at Rógvi Jacobsen vísti høgt støði í sínum spæli.

## Blackpool skoraði fimm

Claus Bech Jørgensen – fyrrverandi føroyskur landsliðsspælari í fótbólti – spældi við allar 90 minuttirnar, tá ið Blackpool leygardagin skoraði heili fimm mál ímóti Charlton í næstbestu ensku deildini. Blackpool spældi á heimavølli, og góðir 9.000 áskoðarar vóru til dystin. Í hálvleiki var støðan 2-2, men so skoraði Blackpool trý mál afturat, og so hjálpti tað lítið, at Charlton fekk sítt triðja mál í dystinum.

Kyndil-StÍF 20-19 (9-9):

# StÍF misti aftur

**Annað vikuskiftið misti StÍF á stokkinum. Hesa ferð tá Kyndil skoraði tey bæði seinastu málini í dystinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Gestirnir hildu seg helst hava gjørt nóg mikið, men annað vikuskiftið á rað misti StÍF tvey stig í seinastu minuttunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyri viku síðani mistu kvinnurnar hjá StÍF stig í evstu løtu, tá tærm vitjaðu hjá Neistanum. Og sunnudagin hendi sama søgan, tá tær enn einaferð ætlaðu sær at mana niðurflytingarspøkilsið heilt í jørðina.

Móti Kyndli var talan alla tíðina um ein serstakliga javnan dyst. Um nakað, so tóktust tær á vitjandi liðnum at hava støðuga yvirvág gjøgnum dystin.

Hóast Rebekka Justinussen varð mansvard í longum løtum, so megnaði Kyndil ongan tíð veruliga at punktera gestirnar. Heldur ikki hóast Jacklin Durhuus enn einaferð sýndi stórspæl, eins og Lina Andriulyte hevði ein av sínum heilt góðu døgum í álopsspælinum.

Í verjuspælinum vóru tær grønu hinvegin ikki so stinnar, sum tær onkra tíð hava verið. Yvirgongdirnar vórðu sjáldan fangaðar, og hetta skapti ofta órógv í verjuni, og serliga kundi Fríðrún Danielsen gera sær dælt av hesum.

Og við Súnfríð Johansen aftur á liðnum hevði StÍF eisini ein eyka strong at spæla upp á í bakspælinum. Hon hevur hæddina og armvíddina til at rúgva nógv upp í verjupartinum, og móti dystarenda tóktist hon hava gjørt nóg mikið, tá hon skoraði tvey av teimum báðum seinastu málunum hjá StÍF.

Nóg mikið var tað tó ikki. Jacklin svaraði enn einaferð aftur, og tá so Ronja Mikkelsen sendi seinasta bóltin í kassan, fekk Kyndil sigurin.

Eisini hóast Rebekka við einum beinleiðis tríggja metra kasti var heilt nær við at javna í seinasta sekundinum av dystinum.

Og so vóru tað aftur tær grønu, sum fegnaðust um tvey stig, meðan StÍF enn einaferð mátti ásanna, at tær vóru ov stuttar. Heilt akuttur er niðurflytingarvandin tó ikki. VÍF skal framvegis hava fimm stig í seinastu dystunum, um tær skulu bjarga sær lívinum, og tann uppgávan kann gerast meira enn bara møtumikil.

### FAKTA

**Kyndil-StÍF 20-19 (9-9)**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 7-5
**40 min:** 12-10
**50 min:** 15-16
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Lina Andriulyte 8(5), Jacklin Durhuus 4(1), Tordis Tróndarson 3, Ronja Mikkelsen 2, Barbara Egilstrøð 1, Randi Wardum 1, Ragnhild á Pløgv 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 7(2), Fríðrún Danielsen 5, Sunfríð Johansen 3, Jóhanna í Króki 2, Rósa Johansen 1, Ninna K. Johansen 1(1)
**Brotskøst:** Kyndil 6, StÍF 5
**Útvísingar:** Kyndil 2, StÍF 3
**Dómarar:** Kári Hansen & Dánjal Samuelsena

## Sveinur Tróndarson í FSF-nevndina

**Bert eittans uppskot er komið til leysa nevndarsessin, og tí verður tað ein skálamaður, sum verður nýggjur í FSF-nevndini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Høgni í Stórustovu gjørdi av at stilla upp til FSF-forsetavalið, gjørdist ein nevndarsessur samstundis tøkur.

Hvørki Høgni ella Óli Holm hava hug at gerast vanligur starvsnevndarlimur, um teir ikki vinna valið annan leygardag, og tí skal nýggjur nevndarlimur veljast.

Freistin at velja hendan var úti fríggjamorgunin, og tá var eittans uppskot innkomið, verður upplýst hjá FSF.

Sveinur Tróndarson, sum hevur starvast nógv innan fjølmiðlar, men sum nú arbeiðir sum grannskoðari, verður nýggjur maður í nevndini. Tað er NSÍ, sum hevur skotið Svein upp til nevndarvalið.



*Sveinur Tróndarson hevur áður verið í nevndini í Flogbóltssambandinum, eins og hann eitt skifti var nevndarlimur hjá Skála Ítróttafelag*